VÁGAR TANN 11. MARS 2017

# FORMANSFRÁGREIÐING

## LANDSFUNDUR 2017

## VÁGAR



BÁRÐUR S. NIELSEN

FORMAÐUR SAMBANDSFLOKSINS

## INNIHALD

INNGANGUR........ 2
POLITISK AVRIK........ 6
FISKIVINNA........ 9
SAMHALDSFØST SAMFERÐSLUSKIPAN........ 13
HEILSUMÁL........ 14
FÓLKAATKVØÐA UM STJÓRNARSKIPAN - FULLVELDISGRUNDLÓG........ 16
POLITISKA UNGDÓMSARBEIÐIÐ Í SAMBANDSFLOKKINUM........ 21
SAMBANDSFLOKKURIN AFTUR TIL POLITISKA VALDIÐ........ 22
ENDI........ 22

## INNGANGUR

Góðu sambandsfólk!

Fyrst av øllum vil eg ynskja tykkum ein góðan morgun.

Vegna Sambandsflokkin vil eg eisini bjóða øllum at vera hjartaliga vælkomin til Landsfundin 2017 - bæði tykkum, sum eru møtt her í Vágunum, og tykkum, ið fylgja fundinum á alnótini.

**********

Hvussu skulu Føroyar vera um 10 ár?

Hetta er ein av teimum stóru spurningunum, ið Sambandsflokkurin – sum ein stórur og ábyrgdarfullur flokkur – javnan setur sær sjálvum og øðrum.

- Skulu vit gera, sum vit altíð hava gjørt – og bara fáa tað sama?
- Ella – skulu vit hugsa nýtt og broyta – fyri at fáa eitt betri og kappingarførari samfelag, har ið allir føroyingar eru vinnarar?

Hjá mær er ongin ivi. Nýhugsan og støðugar broytingar eru lykilin til eina betri framtíð, har ið øll kunnu trívast.

Tað skal ikki broytast bert fyri at broyta.

Vit broyta fyri at tryggja kappingarførið um okkara størsta tilfeingið.

Tað er fólkið, sum búleikast og mennist í okkara fantastiska landi.

Og tað eru teir mongu føroyingarnir, sum búgva og arbeiða í øðrum londum, og sum eru vælkomnir heim at vera við í víðari menningini av samfelagnum.

At vinna kappingina um hendur og heilar er fortreytin fyri framhaldandi vøkstri og vælferð til allar føroyingar.

Og hetta vil eisini gera tað áhugaverdari, betri – og eisini stuttligari – at vera føroyingur í Føroyum.

**************

Hvussu fáa vit

- Bestu heilsuskipan
- Bestu útbúgvingarskipan
- Bestu almannaskipan

Vit hava fólkið, vit hava tilfeingið, og vit hava vitanina.

Men Føroyar stríðast í dag við eitt stýri – eina 14. september-samgongu - sum prioriterar yvirtøkur, tómar almennar stovnar, hóttanir móti vinnulívinum og misskilta nationalismu HÆGRI enn vælferð fyri føroyingar.

Tá ið Føroyar sleppa av við 14. september-samgonguna – vónandi á komandi løgtingsvali – skal skil koma á, og tá fara vit at byggja upp aftur tað, sum liggur í órøkt.

**************

Sambandsflokkurin er ein stórur og samansettur flokkur. Tað setur stór krøv til flokkin og øll tey, sum mynda flokkin dagliga. Vit hava skyldu til at koma við boðum uppá, hvussu samfelagið skal innrættast.

Tað gera vit í felag – og vegna flokkin vil eg takka øllum eldsálum kring landið. Sjálvboðin og tey, sum í allari stillheit gera eitt stórt arbeiði fyri okkara flokk. Ikki minst til valini eru tit hollir stuðlar.

Veljarafeløgini eru somuleiðis ein ógvuliga týðandi partur av arbeiðinum kring landið fyri at menna og gera politikkin hjá Sambandsflokkinum livandi úti millum fólk - tykkara innsatsur hevur stórt virði.

Okkara flokkur hevur eina krútsterka Tingmanning. Tveir fyrrverandi Løgmenn, trýggjar fyrrverandi Landsstýrismenn og ein fyrrverandi borgarstjóra.

Hetta eru roynd fólk, ið taka sær av dagliga politiska arbeiðinum og syrgja fyri, at politisk úrslit kunnu spyrjast burturúr fyri Sambandsflokkin.

Fyrst og fremst eru tað tó veljarar Sambandsfloksins, ið gera allan munin. Tit halda fast um sambandsvirðini og sosialliberalu grundhugsjónina. Uttan tykkara trúfestið og ótroyttandi vilja var ongin flokkur.

Tað eru veljararnir - eldsálir – veljarafeløgini – og tingmanningin – ið eiga flokkin – TIT eru Sambandsflokkurin!

Takk fyri tað!

**************

Nú vit halda landsfund í Vágunum, hava vit boðið umboðum fyri tvey av størstu arbeiðsplássunum í oynni við á okkara fund.

Tey eru Jóhanna á Bergi, stjóri í Atlantsflogi, og Jákup Sverri Kass, stjóri í Vága Floghavn.

Tey fara at greiða frá sínum royndum og væntanum um framtíðina – nú stórur vøkstur hevur verið í virkseminum seinnu árini, og tað nýggjasta er, at kapping verður um ferðafólkini.

Spennandi verður at hoyra, hvørji sjónarmið tey bæði hava til nýggju avbjóðingarnar.

Eisini var tingmanningin í gjár á virkisvitjan í Vágunum, har vit fingu innlit í eitt virkið vinnulív, ið spennir breitt – alt frá aling, framleiðslu av vindeygum, til ferðavinnuna, ið má sigast at hava alstóran týdning fyri alla oynna.

**************

Góðu øll somul - vónandi fáa vit ein gevandi Landsfund. Her verður høvið at umrøða politisku avbjóðingarnar í Føroyum í dag - og framtíðar politisku kósina.

**************

Tá ið eg tók við formansstarvinum í Sambandsflokkinum, visti eg, at ábyrgdin var stór og avbjóðingarnar ikki minni.

Tíðina í andstøðu brúka vit til at brynja flokkin til aftur at taka við landsins leiðslu.

Okkara visjónir og politikkur fyri land og fólk eiga at bera í sær, at Sambandsflokkurin er størsti flokkur í Føroyum.

Hvat er tað so, ið vit vilja?

Ja, vit eru einasti sambandsflokkur í Føroyum, og vit arbeiða fyri Føroyar, føroyingar allar, og fyri samstarvið í Ríkisfelagsskapinum!

Við felagsskapinum tryggja vit Føroysku tjóðini veruligt frælsi, so fólkið, ið her býr, trívist og hevur størsta møguliga persónliga frælsið.

Borgarin – børn og vaksin – skulu hava allar møguleikar, sum eitt nútímans samfelag hevur at bjóða. Vit fara ikki at isolera okkum í norðurhøvum – og vit fara ongantíð uppá kompromis við vælferðina.

Tí velja vit samstarvið í Ríkisfelagsskapinum.

**************

Vit eru einasti sosial-liberali flokkur í Føroyum!

Við liberalu stevnuni gevur Sambandsflokkurin øllum føroyingum møguleika at fara í fría vinnu. Frá okkum fær vinnulívið so góðar umstøður, sum til ber. Menning og íverksetan verður stimbrað – eisini við felags vinnuframaskipanum í Ríkinum.

AFTURFYRI – skal vinnan gjalda sín rímiliga part av vælferðini hjá okkum øllum.

Við sosialu stevnuni vil Sambandsflokkurin, at vælferðin er á norðurlendskum stigi, og tað merkir í heimsflokki. Øll – uttan undantak – skulu hava líka atgongd til vælferðartænastur - og so er tað líka mikið, hvussu nógv ella lítið fólk forvinna. Og hond skal takast um veiku bólkarnar í samfelagnum.

**************

Sambandsflokkurin bjóðar alt tað, ið nútímans heimsborgarin spyr eftir.

Ein góð javnvág er millum vinnumøguleikar, trivnað og vælferð í einum felagsskapi, har ið øll eru við, og øll eru vinnarar.

**************

Nógv er hent síðani seinasta Landsfund, og politiska støðan og útgangsstøðið í samfelagnum er alla tíðina í broyting.

Útgangsstøðið hjá Føroyum er gott í løtuni. Stórur búskaparvøkstur, serliga frá øktum fiskakvotum, lágt arbeiðsloysi, fólkavøkstur, stórar vinnuíløgur, stórt byggivirksemi hjá landi og kommunum, og avlop á fíggjarlógini.

Men ongin má ivast í, at stórar politiskar avbjóðingar standa fyri framman, eitt nú at framtíðartryggja samfelagið.

Í einum tilfeingisbúskapi vita vit av royndum, at sveiggini í búskapinum kunnu vera stór, og tí ræður um at planleggja og stýra soleiðis, at hesi sveiggj ikki gera óneyðugan skaða á búskapin og elva til kreppu.

## POLITISK AVRIK

Sambandsflokkurin hevur ikki sitið hendur í favn í andstøðu hesi hálvt-annað árini.

Vit hava verið aktiv.

Flokkurin ynskir at taka samfelagsábyrgd og hava ávirkan, har hann kann fáa tað. Tí vil flokkurin eisini virka og samstarva konstruktivt í málum, sum hava týdning fyri samfelag og vinnu.

Hetta kunnu vera mál, ið eru so mikið týðandi fyri menningina av samfelagnum, at tey ikki eiga at brúkast í einum partapolitiskum spæli.

Sambandsflokkurin vil, sjálvt í andstøðu, ikki bara virka sum ein nei-flokkur ella bara reagera, tá okkurt rekst framvið á politiska leikpallinum.

Vit hava í hesi tingsetuni lagt fleiri lógaruppskot fyri Tingið. Harafturat hevur flokkurin roynt at samstarvað um týðandi mál ella nýskipanir, eitt nú um eina fiskivinnunýskipan og eina pensjónsnýskipan. Hetta hevur týdning, tí fólk skulu vita, hvar ið tey hava Sambandsflokkin.

Sambandsflokkurin hevur eisini sett landsstýrisfólkum eina røð av munnligum og skrivligum fyrispurningum. At seta spurningar hevur týdning, tí vit upplivað í hesi tíð, at summir fjølmiðlar – sum vóru sera kritiskir áðrenn valið – eru givnir at seta kritiskar spurningar, nú 14. september-samgongan er í Tinganesi eitt skifti.

Harumframt hava tingfólk lutttikið aktivt í almenna orðaskiftinum.

Onkur vil vera við, at Sambandsflokkurin eigur at gera meira burturúr alment at føra fram sínar politisku meiningar sum andstøðuflokkur, og at samgongan sleppur ov lætt við sínum politikki og ætlanum.

Til hetta kann sigast, at tað altíð vil vera ein spurningur um balansugongd, nær ein gerð ov lítið ella ov nógv burturúr, sum andstøðuflokkur.

Sambandsflokkurin hevur valt at kommentera og stundum talað at, um tey mál, sum eru týðandi fyri at føra góðan sambandspolitikk.

Vit fylgja eisini  væl við, hvat hendir við pensjónsnýskipanini, ætlanunum at gera eina stjórnarskipan, o.s.f.v.

Í málinum viðvíkjandi einari fiskivinnunýskipan gjørdi Sambandsflokkurin eitt ítøkiligt uppskot, sum sær út til at gerast avgerandi partur av tí lógaruppskoti og fiskivinnunýskipan, sum nú er lagt fyri Løgtingið.

Her tók flokkurin ábyrgd og gekk á odda við at “bróta ísin”. Hóast samráðingarnar ikki bóru á mál, kunnu vit staðfesta, at vit hava sett dagsskránna í arbeiðinum og øllum orðaskiftinum um fiskivinnunýskipan.

Fólk skulu vita, hvar ið tey hava Sambandsflokkin.

************

Úrslitið av kommunuvalinum 8. november 2016 gjørdist ikki serliga gott fyri Sambandsflokkin, hóast valevnini og flokkurin gjørdu ein stóran innsats.

Fyri at siga sum er, hava vit avbjóðingar í høvuðstaðnum. Har stendur Sambandsflokkurin ov veikur, og har skal ein týðandi innsatsur gerast til komandi løgtingsval og fólktingsval. Men eisini í øðrum økjum í landinum var úrslitið svikaligt.

************

Sambandsflokkurin kann staðfesta, at verandi samgonga er farin undir at fyrireika eina røð av politiskum verkætlanum um nýskipanir. Talan er um nógvar nýskipanir. Men framdriftin í fleiri av hesum nýskipanum er einki serliga stór. Tey sigla í tungum sjógvi - og nakrar ætlaðar nýskipanir eru meira og minni steðgaðar upp.

Í stóran min rekur 14. september-samgongan symbolpolitikk. Tað skal síggja út sum, at ein hópur av málum verða viðgjørd og fara at verða avgreidd. Symbolpolitikkurin er tó, fyri stóran part, heit luft og onki annað.

Hví brúka nógva orku og pengar uppá aftur at seta á stovn ein Landsbanka, sum onga tjóðbanka-funktión hevur?

Hví seta pening í ein grunn, meðan landskassin skyldar omanfyri 5 mia. kr. – reinur symbolpolitikkur.

Hví skapa eyka umsiting, heldur enn betra vælferðina ?

Jú - orsøkin er, at Tjóðveldi og Framsókn skulu kunna siga, at nú hendir okkurt á fullveldisleiðini. Reelt flytir symbolpolitikkurin onki. Slett onki.

Í Sambandsflokkinum harmast vit um, at Javnaðarflokkurin - okkara gamli samstarvsflokkur - letur seg draga upp á tráð av Tjóðveldi og teirri misskiltu nationalismuni.

Javnaðarflokkurin fór til val sum samríkisflokkur. Men hann sveik sínar veljarar og síni vallyfti - og fór uppí hjá Tjóðveldi, sum hevur eittans mál: at taka av Ríkisfelagsskapin, sum Javnaðarflokkurin segði seg stuðla áðrenn valið.

Bæði vit og mong, sum valdu Javnaðarflokkin seinasta løgtingsval, vóna, at flokkurin kemur afturíaftur, og vendir aftur til síni virðir. Tað hevur týdning at vera trúgvur ímóti sær sjálvum – eisini í politikki.

***************

Hvar er alt tosið um at tryggja fíggjarliga haldførið, hjá Føroyum? Afturgjald av stóru skuldini hjá landinum, og at fremja bygnaðarbroytingar innan tað almenna? Menna fleiri vinnulig arbeiðspláss á landi? Tálma ovurstóra íløguáhugan hjá tí almenna? Og so framvegis.

Búskaparráðið hevur fleiri ferðir staðfest, at búskaparliga langtíðar haldførið ikki er nøktandi í almenna geiranum. Tørvur er á broytingum, og Føroyar mugu lagast til tað lítla samfelag, ið vit hava.

Í síðstu viku staðfesti Búskaparráðið, í síni nýggjastu frágreiðing, at samgongan onki hevur gjørt fyri at betra haldførið. Onki!

Tað er heilt týðuligt, at í løtuni er ongin, sum rættuliga hættar sær at tosa um at vera ansin og at brynja okkum til verri tíðir, uttan at verða kallaður ljósasløkkjari.

Í løtuni sær tað eisini út til, at samgongan og landsstýrið seta mál á politisku dagskránna, sum skapa nógva órógv og spjaðing í fólkinum.

Hví ikki heldur seta mál á politisku dagskránna, sum skapa vinnulig arbeiðspláss og inntøkur – og sum hava við sær, at vit kunnu yvirliva búskaparliga og varðveita okkara vælferðarsamfelag?

Vit fara ongantíð at yvirliva og klára okkum sjálvi við populistiskum og nationalistiskum dreymum, men einans av hørðum arbeiði og realpolitikki!

**************

Sambandsflokkurin veit, at tað er millum valini, at flokkurin skal vinna komandi løgtingsval og fólkatingsval – og ikki 4-6 vikur áðrenn valdagin.

Flokkurin hevur eftir seinasta løgtingsval og teimum seinastu veljarakanningum at døma, ikki rættuliga vunnið sínar veljara aftur frá 2011. Flokkurin arbeiðir tí hart við at menna politikkin, virka konstruktivt í politiska arbeiðinum, og annars vera til reiðar til eitt komandi val.

Tað er kortini ikki nakað nýtt, at Sambandsflokkurin stendur seg minni væl í veljarakanningum, og hevur ikki sterkan vind í seglunum í góðum tíðum.

Spurningurin er, hvat ið okkara umleið 6.000 veljarar og teir, sum í løtuni ikki velja flokkin, vilja hava okkum at seta á politisku dagskránna, og hvat tørvur er á, millum teir mongu málbólkar, ið velja flokkin.

Tað ræður um at lurta, eygleiða, velja út, og loysa tey mál, sum gagna breitt og gagna áhugabólkum við serligum tørvi á hjálp, og annars vera framsíggin - verða uppá forkant.

Og tað ræður eisini um at reka veruligan sambandspolitikk, so øll vita, hvar ið tey hava Sambandsflokkin.

Eitt er vist! Og tað er, at flestu av okkara veljarum vænta, at vit eru við til at taka stór politisk tøk, og at okkara sambandspolitikkur slær ígjøgnum í samfelagnum og í vinnuni.

**************

Eg fari nú at greiða nærri frá, nøkrum útvaldum málum, ið eru týdningarmikil.

## FISKIVINNA

Vit spola tíðina aftur til 1895.

Tá skrivaðu Føringatíðindi, at føroyski búskapurin var alt ov nógv tengdur at fiskivinnuni, og tí var neyðugt, at fjøltátta búskapin.

Hóast hetta er meira enn 100 ár síðani, stendur fiskivinnan, saman við alivinnuni, framvegis fyri omanfyri 90 % av okkara útflutningsvirði.

Tað nýtist ikki at verða nakað galið við hesum.

Tað, sum er umráðandi, er, at vit sum samfelag fáa størst møguligt virði burturúr okkara tilfeingið.

Her hevur Sambandsflokkurin eitt púra greitt boð uppá, hvat skal til, fyri at økja munandi um hetta virði.

Okkara umboð í Fólkatinginum seinastu árini, Edmund Joensen, lat eina kanning gera, sum púra greitt vísir, at vit kunnu - í minsta lagi - tvífalda útflutningsvirðið frá fiskivinnuni.

Úr 6 milliardum upp í 12 milliardir.

Vit skulu fara frá at verða rávøruveitari, til at framleiða matvørur á hátøkniframleiðsluvirkjum. Vit skulu hava nýggj arbeiðspláss, bæði til arbeiðsfólk og til fólk við hægri útbúgvingum.

**************

Lykilin til at tvífalda útflutningsvirðið er at fáa eina betri marknaðaratgongd til okkara best betalandi og tryggasta markna, ES-marknaðin. Saman við eini skipaðari vinnupolitiskari ætlan.

Sambandsflokkurin legði í hesum sambandi tvey uppskot fyri Løgtingið, ið blivu einmælt samtykt. Síðani hevur verið samskift við Landsstýrið um, hvussu vit skulu fáa framt hesi fyri Føroyar týðandi mál, ið kunnu tvífalda útflutningsvirði av fiskavørum, skapa nýggj arbeiðspláss og betra vælferðina.

- Vit hava fólkið
- Vit hava tilfeingið
- Vit hava vitanina
- Og Sambandsflokkurin hevur viljan!

Vit skulu spesialisera okkum á fiskivinnuøkinum.

Vit skulu verða førandi í nýskapan og menning, á sjógvi og landi.

Og vit skulu leggja okkum í seðlarnar fyri, at fáa enn størri virði burturúr fiskivinnuni, tí enn eru ótroyttir møguleikar.

- Okkara partur av ferðandi fiskastovnunum skal økjast
- Vit skulu hava nýggjar kvotur í øðrum londum og altjóða sjógvi
- Vit skulu troyta øll okkara rættindi á hvørjum árið fyri at varðveita hesi rættindi

Sambandsflokkurin hevur við sínum miðvísa arbeiði lagt lunnar undir eina fiskivinnunýskipan, har ið høvuðsvinnan kann fleirfalda íkastið til føroysku vælferðina.

Hetta er ein visjón hjá Sambandsflokkinum – og hetta er ein visjón, sum vil nakað!

**************

Tað er greitt, at fiskivinnan, enn sum áður, í løtuni hevur, og frameftir fær ein altavgerandi týdning fyri landshúsarhaldið. Serliga tá hugsað verður um, at góðar 600 mió. kr. komu í landskassan í 2016 - í beinleiðis inntøkum frá fiski- og alivinnuni.

Hesar inntøkur eru at rokna sum óvissar inntøkur, og tí er neyðugt at leiða og stýra landskassan við fastari hond, og gjalda niður skuld og annars konsoliderað landskassan til verri tíðir.

Sambandsflokkurin fór í føraratroyggjuna í málinum um eina nýskipan av fiskivinnuni, og flokkurin gjørdi sítt egna uppskot um eina fiskivinnunýskipan. Endamálið við uppskotinum var at hava eitt ítøkligt boð uppá eina fiskivinnu-skipan, sum liður í einari breiðari politiskari semju.

Flokkurin hevur fingið nógvar positivar afturmeldingar um hetta tiltak.

Tað sær út til, at nógvum dámar, at flokkurin á henda hátt "breyt ísin" og setti ferð á at fáa loyst hetta politiska stórmál.

Sambandsflokkurin heldur seg í fiskivinnupolitikkinum til meginreglurnar um at reka fiskivinnuna búskaparliga og lívfrøðiliga burðardygt.

Ræðisrætturin til føroyska tilfeingið skal verða á føroyskum hondum.

Fiskiríkidømið er ogn landsins og kann ongantíð gerast privat ogn - lat ongan iva verða um tað. Øll veiðirættindi eru ein brúksrættur.

Sambandsflokkurin góðtekur ikki rullandi loyvir og óavmarkaðan ognar- og ræðisrætt til vinnuna. Heldur ikki, at bankar fáa veð í veiðuloyvum, tí tað svarar til at avhenda ognar- og ræðisrættin til bankarnar.

Gjald skal latast fyri henda brúksrætt og framíhjárætt at veiða.

Sambandsflokkurin heldur, at vinnan eigur at fáa støðugar karmar, fyri at kunna tilrættaleggja raksturin yvir eitt longri áramál. Tí er okkara uppskot at loyvini verða latin við eini uppsagnarfreist á 8 ár, við tí endamáli at vinnan kann gera neyðugar íløgur og skipa raksturin optimalt.

Sambandsflokkurin ræðist ikki avmarkaðan útlendskan ognarskap í fiskivinnuni, men ræðisrætturin skal liggja hjá okkum føroyingum.

Vinnan skal eggjast til og krevjast skal, at øll fiskirættindi á heimshøvunum verða gagnýtt til fulnar - at allur fiskurin verður gagnnýttur - og at alt skal upp á land í Føroyum.

Nýggj fiskirættindi skulu vinnast nær og fjar, og týdningarmest av øllum er, at vinnan útflytur matvørur heldur enn rávøru.

Tað er fríur handil á ES-marknaðurin fyri fiskavørur, sum er áhugaverdur og sum kann økja virðini.

*************

Eftir drúgva tíð og mikið stríð um, hvat nýggja fiskivinnuskipanin skuldi innihalda, legði Landsstýrið sítt boð fram á tíðindafundi mánadagin.

Var hetta nú teirra boð?

Tað var ein heilt serlig kensla, at verða til henda tíðindafundin. At síggja landsins kosnu menn, standa har og leggja Sambandsfloksins skipan fram.

Hetta er okkara skipan, har nøkur ting eru kroyst inn og brongla samlaðu skipanina, so hon ikki longur hongur saman.

Vit kunnu velja, at kæra okkum um, hví samgongan fyrst kopierar okkara skipan og avbronglar hana. Ella vit kunnu fegnast um, at okkara skipan hevur vunnið hevd, og so brúka komandi tíðina til at fáa rættað skeivleikarnar, sum samgongan hevur kroyst inn í okkara skipan.

Tað er heilt óvanligt, at eitt landsstýrið kopierar eitt uppskot hjá einum andsstøðuflokki. Hetta prógvar, at landsstýrið ikki hevur nakað sjálvstøðugt boð uppá eina fiskivinnuskipan.

**************

Enn er nakað eftir á mál við at gera tað politiska hondverkið at skapa innihald í nýggju lóggávuna um fiskivinnuna og at gjøgnumføra nýskipanina. Har ætlar Sambandsflokkurin eisini at gera sína ávirkan galdandi.

Lat tað vera púra greitt! Sambandsflokkurin hevur ikki havt sum mál at hjálpa samgonguni við at yvirliva í málinum um eina nýskipan av fiskivinnuni.

Nei, tað snýr seg um eitt sera týðandi samfelagsmál, sum eigur at rótfestast breitt og ikki gerast til eina partapolitiska kastubløku, nú á 10. ári.

Í øðrum londum er vanligt, at andstøðan er partur av breiðum politiskum semjum í serliga týdningarmiklum málum – og tað vanliga er eisini, at andstøðan setur síni fingramerki á breiðar semjur. Hesa siðvenju eiga vit at hava í Føroyum. Tað er at taka ábyrgd. Og tá ið semjur eru náddar, sum ALLIR partar kunnu liva við, er púra líka mikið, hvør ið situr við valdinum.

**************

## SAMHALDSFØST SAMFERÐSLUSKIPAN

Føroyar eru eitt oyggjaland við firðum og fjøllum, sum - saman við veðri og vindi - seta sínar avmarkingar og forðingar fyri, hvussu frítt vit kunnu ferðast millum oyggjar, býir og bygdir.

Politiskt hava útbyggingarnar av samferðslukervinum havt sum endamál at binda alt landið saman, skapa fyritreytir fyri at búgva, virka og hava eitt arbeiðs-pláss, og annars royna at líkastilla allar borgarar við møguleikum og atgongd til tænastur.

Tí eru brúktar milliardir av krónum seinastu 50 árini fyri at gera íløgur í vegir, tunlar og brýr runt um í landinum.

**************

Fyri at fáa framt nakrar stórar útbyggingar av samferðslukervinum bleiv ein nýggjur fíggingarleistur lagdur fyri Vága- og Norðoyatunnilin. Nú vit standa her í Vágum, mugu øll í dag staðfesta, at hetta hevur verið til gagns fyri allar føroyingar og serliga tey, sum búgva í økinum, ið fingu fast samband undir firðirnar. Ongin ivast longur í, at hesar íløgur vórðu rættar at fremja og hava givið hesum økinum heilt nýggjar møguleikar, fyri menning og vøkstri.

Í løtuni er landfast fyri umleið 85% av fólkinum. Aðrir partar av Føroyum eru við at verða avfólkaðir, serliga útoyggjarnar, samstundis sum bæði Suðuroyggin og Sandoyggin uppliva stóra fólkaminking - ein gongd, sum vísir seg at halda fram.

Føroyar eru eitt oyggjaland við stórari spjaðing í búmynstrinum, t.e. 17 oyggjar, har fólk búgva og umleið 120 bygdir og býir. Nógv fólk koyra dagliga til og frá arbeiði í ein hálvan til tveir tímar tilsamans, hvønn dag. Tí hevur samferðsla vitalan týdning fyri oyggjasamfelagið Føroyar og krevur politiskar loysnir, sum virka og eru burðardyggar.

Samferðslukervið í Føroyum er grundarlagið fyri at binda oyggjar, øki - bygdir og býir saman í eina samanhangandi eind og harvið tryggja javna menning, skapa trivnað, tryggja búseting og líka atgongd til tænastur og møguleikar, uttan mun til, hvar ein býr í landinum, og hvar ein vil arbeiða og ferðast til og frá.

Sambandsflokkurin arbeiðir við at fáa eina samhaldsfasta skipan og harvið tryggja líka atgongd og møguleikar fyri menning, trivnaði, vinnuligum virksemi og arbeiðsplássum og harvið fólkavøkstri kring landið

Ætlanin er, at tað so líðandi verður farið yvir til eina samhaldsfasta landsdekkandi samferðsluskipan. Fyrst skal vegakervið verða ein saman-

hangandi eind. Næsta stigið er ein skipan fyri sjóvegis farleiðirnar, sum tryggjar teimum fastbúgvandi ein lægri prís enn øðrum, ið ikki brúka farleiðina regluliga.

Sambandsflokkurin tekur tí undir við teimum royndunum, ið landsstýrismaðurin í samferðslumálum arbeiðir við í løtuni, har greinað verður millum fastbúgvandi og onnur ferðandi við sjóvegis farleiðunum.

**************

Verandi verklagslógir um undirsjóvartunlarnar báðar kunnu tulkast soleiðis, at tað framhaldandi skal krevjast peningur inn.

Politiskt so er spurningurin, um tað er rætt og rímuligt eisini at krevja meir enn lánikostnaðin afturgoldnan. Eisini hevur tað politiskt verði meldað út gjøgnum tíðina, at tað eru lánini, ið skulu afturgjaldast.

Sambandsflokkurin hevur tí lagt fyri løgtingið lógaruppskot um at avtaka bummgjøldini við tí grundgeving at líkastilla økini í Føroyum við atliti til ókeypis flutning. Endamálið er eisini at útnytta tunlarnar optimalt við tað, at koyringin verður ókeypis. Hetta gevur møguleikar fyri menning og vøkstri, bæði lokalt og fyri landið.

Eg haldi, at vit eiga at halda fram við at gera eina samhaldsfasta samferðsluskipan fyri alt landið og alt flutningskervið.

**************

## HEILSUMÁL

Betur nú, enn fyrr

Oftani hava vit eina mynd av, at fyrr var alt betur – er tað veruleikin ?

Nei – Vit hava nú eitt samfelag, ið tekur sær av teimum veiku, vit liva longri, ríkidømið er størri – so alt í alt hava vit tað betur nú enn fyrr.

Spurningurin er so, um vit eru eydnusamari nú, enn fyrr. Tað er ein heilt annar spurningur, sum eg ikki komi inn á her.

**************

Vit mugu tíverri staðfesta, at stórar avbjóðingar eru í heilsuverkinum. Trupult er at fáa neyðuga talið av læknum til ymisku serøkini, sum so aftur ger tað

trupult hjá verandi læknum, at fáa dagligdagin at hanga saman og at støðast í heilsuverkinum.

Eitt vælvirkandi heilsuverk er eitt av týdningarmestu kappingarparametrunum um okkara dýrabærasta tilfeingið, ið er fólkið, ið her virkar og búleikast. Sambandsflokkurin vil tí seta neyðugar recoursir av til økið.

Vit skulu velja, hvørji serøkir skulu verða í føroyska heilsuverkinum, so útgerða vit okkum fult út á teimum økinum.

Sambandsflokkurin vil tryggja, at borgarin fær vanligar viðgerðir innan 1-2 mánaðar.

Føroyar hava valt eina fólkaræðisliga vælferðarskipan, sum eisini er høvuðs-táttur í sosialliberalu hugsjónini hjá Sambandsflokkinum.

Øll hava atgongd til almennar tænastur sum t.d. skúla, heilsuverk og almannaverk - uttan mun til inntøku og støðu annars.

Almannatænastur eru nógv mentar seinastu árini, og tað ber í sær øktar kostnaðir, bæði tá talan er um rakstur, lógarbundnar útreiðslur og íløgur.

Tað er vert at nevna, at undanfarna samgonga, hóast fíggjarligar trongar tíðir, játtaði munandi meira til rakstur og framdi stórar íløgur innan heilsumál, almannamál og mentamál.

Hetta undirbyggir, at vælferðarøkið er eitt av politisku hjartamálum Sambands-floksins og at vit halda fast við sosiala politikkin hjá flokkinum.

Enn er tó nógv at gera á heilsuøkinum. Ikki minst er endurvenjingin ein týðandi táttur, og sum framkomið land skulu okkara borgarar hava góð tilboð um endurvenjing. Tað er fyrst og fremst fyri virðiligheitina hjá tí einstaka borgaranum, at koma skjótast tilber útaftur til eitt virkið lív. Hetta er samstundis ein íløga fyri samfelagið, ið vit fáa innaftur, við tað, at borgarin kemur úr aftur almennu skipanunum skjótari enn annars.

**************

Vit mugu leita nøkur ár aftur í tíðina, fyri at síggja, hví pengar mangla til eitt nú heilsuverkið.

Niðurskurðinum í ríkisveitingini, ið fullveldisflokkar gjørdu uttan nakrar sum helst útrokningar av avleiðingunum, sum hetta fekk á framtíðar vælferðar-samfelagið, er nokk høvuðsorsøkin.

Niðurskurðurin bleiv gjørdur í óðum verkum, yvir nátt, tí at fullveldissamráðingarnar vóru slitnaðar, og fullveldissamgongan hevði mist alt á gólvið.

Hóast vit hava havt búskaparligt viðrák seinastu árini, mangla framvegis pengar til so týðandi økið, sum okkara heilsuverk.

Fullveldisflokkarnir mugu siga Føroya fólki, hvar pengarnir, sum mangla til vælferðarøkini, skulu koma frá.

**************

Heilsa og trivnaður eiga at merkja okkara samfelag, og støðugt má arbeiðast fyribyrgjandi við tí endamáli at tryggja borgarum eitt dygdargott lív, og at sum mest fæst fyri skattakrónurnar.

Ein felags leiðsla í øllum sjúkrahúsverkinum er eftir mínum tykki ein skilagóður tanki.

Sum lítið land við avmarkaðari fíggjarorku eiga Føroyar at samstarva við útlendsk sjúkrahús um viðgerðir av ymiskum slag – og tað er upplagt at samstarva við Danmark, ið hevur eitt vælvirkandi sjúkrahúsverk – har samstarvið gjøgnum tíðirnar hevur verið fyrimyndarligt.

Sambandsflokkurin vil ikki spara uppá viðgerðir uttanlands og neyðugar viðgerðir innanlands. Vit vita, at úrslitið kann gerast, at tað í longdini gerst dýrari, tí fólk ikki sleppa aftur til arbeiðis.

Sambandsflokkurin fer eisini at virka fyri, at bíðilistar til sjúkraviðgerðir generelt verða styttir, og flokkurin stendur við sína ætlan um viðgerðartrygd í samstarvi í Ríkisfelagsskapinum.

## FÓLKAATKVØÐA UM STJÓRNARSKIPAN - FULLVELDISGRUNDLÓG

Fullveldisgrundlógin, ið hevur verið ávegis síðan aldarskiftið, er nú aftur á breddanum hjá 14. september samgonguni við Javnaðarflokkinum á odda.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum boðaði 10. februar í ár frá, at fólkaatkvøðan um stjórnarskipan verður flaggdagin 25. apríl í 2018 - og ikki í 2017, sum samgonguskjalið leggur upp til. Tað gevur so samgonguni eitt andarhol til, at fáa eina semju um málið.

Løgmaður sigur, at Landsstýrið miðar eftir, at ein breiður meiriluti í Løgtinginum og fólkinum fer at taka undir við stjórnarskipanini.

Tað er onki dulsmál, at flokkarnir eru ósamdir um ymiskar lutir í stjórnarskipanini, og hetta hevur ávirkað tilgongdina.

Sambandsflokkurin var við í eini neyðsemju millum allar flokkar um málið í 2011, vit minnast eisini hvør tað var, ið ikki kundi standa við semjuni – tað var Tjóveldi, ella ein partur av sama.

Tað er ein flokkur á Tingi, ið skal fáa allan sín vilja í hesum málinum – og tí er uppgávan hjá Løgmanni “Mission impossible”.

Eftir ætlan skuldi fólkaatkvøða verða í heyst, nú er hon ásett til 25. apríl 2018. Løgmaður ætlar at leggja stjórnarskipanina fyri løgtingið á Ólavsøku, og tann viðgerðin skal verða liðug 25. oktober, hálvt ár áðrenn sjálva fólkaatkvøðuna. Tað er ikki serliga lang freist til eitt mál, ið skal eitast at vera grundarlag undir øllum stýrislagnum.

Hetta málið hevur sum endamál at skapa politiskar ósemjur og spjaða fólkið í Føroyum.

Høvuðsmálið er at loysa Føroyar úr Ríkisfelagsskapinum. Og man vil skapa óstabilitet, ótryggleika og fremja stór afturstig fyri land og fólk.

14. september-samgongan vil lirka loysingina inn gjøgnum bakdyrnar. Hetta sær man við, at samgongan vil broyta galdandi stýrisskipan, sum greitt ásetur, at tvey fylgjandi Løgting skulu samtykkja broytingar í okkara stýrislagið.

Tað skal verða lættari at trýsta loysingina ígjøgnum – nú skal tað bráddliga bara vera eitt Løgting, sum eftir nýggju stjórnarskipanini skal kunna loysa Føroyar úr Ríkisfelagsskapinum.

Hetta er at undirgrava fólkaræðið í Føroyum, og hetta fær Sambandsflokkurin ikki at góðtaka.

Tí er nógv tann størsta politiska uppgávan hjá okkum at bjarga Føroyum undan 14. september-samgonguni.

*************

Ein stórur spurningur er, um 14. september-samgongan hevur fólkið við sær?

Svarið er eitt greitt NEI.

Samgongan arbeiðir móti fólksins vilja við at fyrireika eina loysing!

Hetta verður staðfest í einari rættuliga nýggjari veljarakanning hjá Gallup frá november 2016. Henda kanning vísir greitt, at ein meiriluti av føroyingum tekur ikki undir við loysing, sjálvt um ongin ríkisveiting var.

Tí er tað ótrúligt, at loysingarsamgongan við einum javnaðarløgmanni á odda vil skerja møguleikarnar fyri at tryggja vælferðarstøði, hóast fólkið vil nakað annað.

Samgongan hevur frá fyrsta degi skapt konfrontatiónir við Danmark, heldur enn at fara eftir loysnum fyri at fáa fult gagn av øllum møguleikunum, sum Ríkisfelagsskapurin bjóðar.

**************

At Javnaðarflokkurin, sum var ein samríkisflokkur, spælir við í hesum, er óskiljandi.

Og tað er upp aftur verri, at formaðurin í Javnaðarflokkinum billar fólki inn, at felags grundlógin í ríkinum og tjóðveldisgrundlógin hjá samgonguni skulu standa lið um lið.

Og tað er ikki bara óforsvarligt – men eisini til stóran skaða – at Føroyar á Fólkatingi eru umboðaðar av tveimum víðgongdum fullveldismonnum.

Fyri tað mesta brúka teir Fólkatingið sum ein skemtipall. Og tá ið teir ikki bróta inn opnar dyr, og gera Føroyum fyri skommum, er óbúgvið knarr á skránni – ella verður prædikað um tjóðveldisgrundlógina.

Takið ikki feil. Fremsta málið hjá Tjóðveldinum og Javnaðarflokkinum á Christiansborg er at loysa Føroyar úr Ríkisfelagsskapinum og úr Ríkinum.

Mín áheitan á føroyingar er púra klár!

Veljið eitt sambandsumboð, tá val aftur verður til Fólkatingið. Ongantíð hava Føroyar fingið so nógv og góð úrslit, sum tá ið Sambandsflokkurin hevur havt umboðanina.

Okkara flokkur er hóvligur, semjusøkjandi og samstarvssinnaður.

***********

Støðan hjá Sambandsflokkinum er krystall-klár. Vit halda okkum sjálvandi til felags grundlógina í ríkinum, sum tryggjar føroyingum ríkisborgaraskap og hópin av rættindum, sum vit kunnu njóta gott av. Eins og øll grundleggjandi, demokratisk rættindi.

Vit fara ikki at mæla nøkrum til at leypa út í myrkrið. Tí fólkaatkvøðan næsta ár eru veruliga eitt lop út í myrkrið.

Ríkisfelagsskapurin er við til at tryggja eitt kappingarført vælferðarsamfelag. Við ríkisborgaraskapinum hava vit føroyingar einastandandi møguleikar fyri útbúgving, menning, arbeiði í og uttan fyri ES, og samstarvi á øllum økjum og á jøvnum føti.

Vit hava atgongd til alt, sum Ríkið bjóðar ríkisborgarum, og við reyða passinum í hondini røkka vit møguleikum langt út um Ríkisfelagsskapin.

Reyða passið er forrestin – eftir einari kanning - tað passið, sum flestu fullveldisfólk brúka. Tað tykist sum eina anakronisma í einum umhvørvi, har ið man ynskir Ríkisfelagsskapin hagar, ið piparið grør.

Lat meg sláa rimmar fast, at í Ríkisfelagskapinum teljast føroyingar millum frælsastu fólk í heiminum!

**************

Tað kom helst dátt við hjá loysingarflokkunum, tá lánsveitarar til Eysturoyar- og Sandoyartunlarnir í avtaluni hava tryggjað sær, at lánsavtalan kann uppsigast, um ríkisrættarligu viðurskiftunum broytast.

Eisini Moody’s, ið ratar landskassan, ger á hvørjum árið vart við, at Ríkisfelagsskapurin er ein fortreyt fyri høgu ratingina. Hetta tryggjar okkum betri kreditvirði og harvið lægri rentur til vinnu og húsarhald.

Um ratingin lækkar, og rentan til dømis hækkar 2%, merkir hetta fyri eina unga familju, ið hevur bygt síni egnu hús, og skyldar tvær mió. kr., at tey skulu av við 40-túsund krónur meira í rentu um árið – hvørt ár.

Hetta kann gerast veruleikin, um samgongan fær sín vilja við síni kamufleraðu tjóðveldisgrundlóg, sum tey nú nevna “samleikaskjalið”.

**************

Hóast landsstýrið vil gera nógv burturúr at orða stjórnarskipanina so breitt, at øll skulu kenna seg aftur í henni, so er fatanin uttanlands, at Føroyar eru á veg úr Ríkisfelagsskapinum.

Fleiri útlendskir miðlar hava borið søguna um fólkaatkvøðuna, føroyingar skulu til tann 25. apríl í 2018.

Nakrar av yvirskriftunum eru, frá USA og líka til Russlands:

"Føroyar atkvøða um stjórnarskipan sum slóðar fyri fullveldi".

Sagt verður, at fólkaatkvøðan næsta ár er fyrireiking til eina nýggja atkvøðu um loysing frá Danmark.

"Farvæl Føroyar: Oyggjarnar í Atlantshavi reka ímóti skilnaði frá Danmark".

Sostatt fata sjálvt uttanfyristandi eygleiðarar hesi tíðindi sum eina loysingar-ætlan hjá samgonguni.

Tað, sum er vandamikið, er, at henda loysingarætlan, eisini í altjóða høpi, skapar órógv og skaðar tað støðufestið, sum Ríkisfelagsskapurin hevur við sær.

Við hesum er ongin ivi um, at lánsveitarar, veitarar til vinnuna o.o. fara at hava eitt vakið eyga við gongdini, og vilja um neyðugt, vísa afturhaldni, seta harðari krøv – og tá verður truplari at liva og virka í Føroyum.

Tað má ikki fáa loyvi at henda, og ongin skal ivast í, at Sambandsflokkurin stríðist av øllum alvi ímóti tjóðveldisgrundlógini.

**************

Samgongan er - sum tit vita - farin at kalla tjóðveldisgrundlógina eitt samleikaskjal - fyri at gera tað meira óskyldugt og ófarligt.

Men hetta er ikki nakað, sum broytir veruleikan. Talan er um eina loysingargrundlóg. Hvørki meira ella minni.

Og tað er eitt faktum - og tað vita øll - at Føroyar kunnu ikki hava tvær grundlógir.

Skil má vera í, og tað er væl skiljandi, at eisini danska stjórnin meldar klárt út. Man má velja millum grundlógina og stjórnarskipanina.

Annaðhvørt er man innan fyri felags grundlógina og við í Ríkisfelagsskapinum. Ella er man uttan fyri felags grundlógina og úti úr Ríkisfelagsskapinum.

Tað nyttar onki at uppføra seg sum eitt forkelað smábarn í kioskini, og halda, at man fær alt.

Nei – nú er at vera vaksin og taka veruleikan, akkurát sum hann er.

Tú fært ikki alt.

Og tú mást velja, hvat ið tú vilt fyri teg sjálvan, fyri framtíðina hjá tær, tínum børnum, og teirra børnum.

Hetta er eitt álvarsligt val, sum fær týdning fyri teg og tínar eftirkomarar í alla framtíð.

*************

## POLITISKA UNGDÓMSARBEIÐIÐ Í SAMBANDSFLOKKINUM

Sum formaður kann eg fegnast stórliga um, at Ungmannafelagið Samband er aktivt og sjónliggerð Sambandsflokkin og politikk okkara.

Tit ungu, ið taka lut í politiska arbeiðinum, eru eitt stórt aktiv fyri flokkin, og vit eru errin av tykkum.

Sum land skulu vit bjóða ungum møguleikar, sum ung eftirspyrja. Eitt er útbúgving, og annað eru læruplláss.

Men eg hugsi eisini um umhvørvir við nýhugsan og nýskapan, har sum ung sjálvi seta dagsskránna og royna síni evni á ymiskan hátt.

Tess áhugaverdari Føroyar eru fyri ung, tess størri eru sannlíkindini fyri, at Føroyar blóma.

Tit ungu, sum umboða Sambandsflokkin, eru tey, sum skulu taka við sum sambandspolitikarar, og royna at fáa teir yngru veljararnar at velja okkara flokk og teir ríku møguleikar, sum okkara politikkur letur upp fyri.

Sambandsflokkurin ætlar her at gera ein miðvísan innsats fyri at hjálpa til. Eitt nú at verða úti í markini saman við tykkum ungu politikarum til almen tiltøk. Og flokkurin hjálpir eisini til við at planleggja ymiskt virksemi, og soleiðis eggja ungum til at halda fram við tí góða arbeiðinum fyri flokkin.

Sum nevnt: Vit eru glað fyri tykkum og errin av tí arbeiðinum, sum tit fáa frá hondini.

Takk fyri tað.

## SAMBANDSFLOKKURIN AFTUR TIL POLITISKA VALDIÐ

Sambandsflokkurin er til reiðar at gerast partur av landsins leiðslu og stýri.

Hvat er tað at verða til reiðar? Jú, tað er at hava eitt greitt politiskt boð uppá, hvat Føroyar hava tørv á, og hvørji mál eiga at setast fyri okkara land.

Vit skulu ikki brúka tíð og orku uppá at líta aftur eftir ella koyra frameftir við at hyggja í bakspegilin.

Hetta merkir, at vit politikarar í flokkinum skulu hava dirvi og áræði til at taka avgerðir og handla. Tað merkir eisini, at vit alla tíðina skulu vera sjónlig í almenna rúminum, soleiðis at veljarin veit, hvar hann hevur Sambandsflokkin.

Vit hava víst, at Sambandsflokkurin hevur nakað at bjóða uppá í landsins leiðslu.

- Vit hava eitt greitt boð uppá ein framtíðar fiskivinnupolitik
- Vit hava eitt boð uppá, hvussu vit tvífalda útflutningsvirði
- Eitt púra greitt boð uppá, hvussu vit lyfta heilsuverkið
- Boð uppá, hvussu vit lyfta útbúgvingarstøði
- Og vit hava greið boð uppá vinnupolitikk

Og Sambandsflokkurin hevur eisini eitt krystall-klárt boð uppá, hvussu vit langtíðartryggja samfelagið Føroyar

Vit hava boð uppá øll samfelagsviðurskifti, og tí vita føroyingar, hvar ið teir hava Sambandsflokkin.

Her er ongin slingur, og ongar duldar dagsskráir.

Vit eru trúgv ímóti okkara stevnu og móti okkum sjálvum sum sambandsfólk.

**************

## ENDI

Góðu sambandsfólk!

Fremsta málið hjá Sambandsflokkinum vil altíð vera, at føroyingar allir trívast í okkara fantastiska landi.

At tjóðin mennist, úti og heima, við møguleikum, spennandi avbjóðingum og fyritakssemi, ið skapa framgongd og vøkstur fyri øll.

At vinnulívið er við til at fíggja vælferðina, ið øll hava javnbjóðis atgongd til.

At vit lofta og hjálpa veikum bólkum í samfelagnum.

At samstarvið í Ríkisfelagsskapinum er ein lykil til gott samstarv og økta felags vælferð.

Og at ríkisborgaraskapurin er atgongumerkið til allar tænastur Ríkisins í Danmark og víðari úti í Europa og um allan heim.

Føroyingar hava atgongd til tað besta úr tveimum londum, sum tilsamans munnu vera heimsins smørhol.

So mong vórðu orðini - og við hesum leggi eg upp til politiskt orðaskifti.

Framhaldandi góðan landsfund øll somul.

Takk fyri!